# Tekningarnar til Auschwitz-leguna funnar í Berlin

**Nakrir menn, sum skuldu nútímansgera eina íbúð í Berlin, komu fram á nøkur sera forvitnislig skjøl - tekningarnar av týningarleguni í Auschwitz**

UTTANEFTIR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: Bild*



*Tekningarnar av bygningunum eru sera neyvar*

70 ár eftir ta sokallaðu Krystallnáttina tann 10. november í 1938 kundu fleiri týsk bløð almannakunngera nakrar tekningar, sum bara nøkur fá høvdu sæð fyrr, og sum uppaftur færri vistu um at siga nú.

Bløðini vistu at siga, at í sambandi við umvælingararbeiði í einari íbúð í Berlin vóru fólk komin fram á eina gula mappu. Í henni lógu 28 pappírssíður. Tekstsurin var ein neyv frágreiðing um eina legu, sum skuldi brúkast til at týna jødar í, og saman við frágreiðingini vóru tekningar, sum vístu, hvussu legan skuldi byggjast, skipast og brúkast.

Frágreiðingin er dagfest tann 23. oktober í 1941.

Sambært teimum týsku bløðunum er talan um eina stórhending, og innihaldið í frágreiðingini er eisini kollveltandi sambært blaðnum Bild, tí tað prógvar, at longu tíðliga høvdu nazistarnir ætlanir um at beina fyri jødum og sigoynarum í stórum tali.

Bild var tað fyrsta blaðið, sum prentaði frágreiðingina og tekningarnar, og tað var neyvan av tilvild, at tað bleiv gjørt sama dag, sum týskarar og onnur mintust ræðuleikarnar Krystallnáttina fyri 70 árum síðani, tá nazistarnir av álvara fóru undir herferðina ímóti teimum týsku jødunum, og sum endaði við Holocaust.

## Mátti útbyggjast

Auschwitz er tað týska navnið á polska býnum Oswiecim, og har bygdu nazistarnir eina risastóra savningarmegu, sum skuldi brúkast til at útrudda jødarnar í øllum teimm londunum, sum týski herurin hevði hersett í Evropa.

Legan bleiv bygd í 1940, og tað var SS-ovastin Heinrich Himmler, sum hevði umsjón við arbeiðinum. Teir fyrstu jødarnir vórðu fyribeindir í leguni við gassi í 1941, men tað vísti seg, at orkan var ikki nóg stór, og tí bleiv ein týningarlega bygd afturat í Birkenau í oktober í 1941.

Tey, sum hava hugt í frágreiðingina og tekningarnar, sum nú eru komin undan kavi, siga, at tað er týðiligt, at ætlanin var at útbyggja og nútímansgera leguna í Auschwitz, so hvørt sum tørvur bleiv á tí.

Í 1942 settu nazistarnir av álvara ferð á jødatýningina í Auschwitz við gassi, og tá tann sovjetski herurin kom til leguna tann 27. januar í 1945 og fríaði teir fangarnar, sum vóru eftir á lívi, høvdu millum 1,5 og tvær milliónir jødar og onnur mist lívið har.

## Ætlanin løgd tíðliga

Millum skjølini, sum lógu í teirri gulu mappuni, er ein neyv byggifrágreiðing um og tekning av einum rúmi, sum á tekningini verður kallað "gasskamar". Har sæst, at hetta rúmið skal vera 11,66 metrar annan vegin og 11,20 metrar hin vegin. Við síðuna av tí er teknað eitt rúm, sum er kallað "avlúsingarrúm", og har skuldu fangarnir avlúsast, áðrenn teir blivu koyrdir í gasskamarið.

Ta endaligu avgerðina um at útrudda teir evropeisku jødarnar tóku nazistarnir í einari ráðstevnu í Wannsee í januar í 1942. Tað var her, teir samtyktu ta tiltiknu "endaligu loysnina", hvørs endamál var at beina fyri jødunum í Evropa, sum um tað mundi vóru umleið 11 milliónir í tali.



*Orðið »gasskamar« sæst týðiliga á tekningunum*

Skjølini, sum nú eru funnin í Berlin, vísa sambært Bild, at nazistarnir høvdu neyvar ætlanir um at útrudda jødarnar, áðrenn tann endaliga avgerðin bleiv staðfest og undirskrivað á Wannsee-ráðstevnuni.

At tann ovasta leiðslan hjá nazistunum var uppií, longu tá tekningarnar av Auschwitz-leguni blivu gjørdar, sæst av, at sjálvur Heimrich Himmler hevur skrivað sítt navn á eina av tekningunum við grønum penni.

## Prógva týningina

Ein av tekningunum í teirri gulu mappuni er av einum rúmi, sum skuldi brúkast til at brenna lík í, og á einari aðrari sæst tað eyðkenda portrið á leguni í Birkenau, har tokini kundu koyra líka inn í leguna við fangunum.

- Byggiætlaninar eru eitt haldfast prógv um ta skipaðu útruddingina av teimum evropeisku jødunum, sigur Hans-Dieter Kreikamp, leiðari á týska ríkisskjalasavninum í Berlin, við blaðið Bild.

- Skjølini vísa, at øll, sum vóru við til at leggja ætlanina um at byggja leguna í Auschwitz, vóru vitandi um, at har skuldu fólk drepast við gassi á ein skipaðan hátt. Skjølini vísa samstundis aftur øllum teimum, sum avnokta jødatýningina, skrivar Bild.

Sambært Reuters hava týsku myndugleikarnir ikki gjørt nakrar almennar viðmerkingar til tað hugvekjandi fundið í Berlin.

## UM AUSCHWITZ - BIRKENAU

- **Auschwitz var tað týska navnið á polsku bygdini Oswiecim, har nazistarnir bygdu ta størstu týningarleguna.**
- **Legan var í trimum: Ein savningarlega, ein týningarlega og ein arbeiðslega fyri trælir.**
- **Ta fyrstu tíðina bleiv legan brúkt til at hýsa polskum fangum, sum frá 1942 bleiv hon brúkt til at týna jødar við gassi.**
- **Legan bleiv eisini brúkt til ómenniskjaligar læknakanningar, millum annað undir leiðslu av lækninum Josef Mengele.**
- **Til 1943 var Rudolf Høss ovasti leiðari fyri Auschwitz-Birkenau, og hann, konan og tey fýra børnini búðu beint uttan fyri leguna. Høss bleiv seinni dømdur til deyða og hongdur í leguni**
- **Umleið 7.000 fólk arbeiddu fyri SS í leguni undir heimsbardaganum.**
- **Eingin veit við vissu, hvussu mong vórðu týnd í Auschwitz-Birkenau, men hildið verður, at talið var millum 1,1 og 1,5 milliónir fólk. Tey flestu doyðu í gasskamari.**
- **Av teimum, sum doyðu í leguni, vóru 1,1 millión jødar, 140.000 póllendingar, 20.000 sigoynarar og 10.000 sovjetskir krígsfangar.**



*Auschwitz í dag. Á hvørjum ári vitja nógv ferðafólk leguna*